# Støðisnámsætlan

# Innleiðsla til verkseting

Innleiðsla til verkseting av støðisnámsætlanini í øllum lærugreinum á øllum stigum í fólkaskúla, yrkisnámi og gymnasialum miðnámi.

| | |
|---|---|
| **Málbólkur:** | Øll starvsfólk skúlans, sum fáast við undirvísing. |
| **Tíð:** | Umleið 1½ tími. |
| **Endamál:** | At fáa innlit í og grunda um støðisnámsætlanina, sum er grundarlagið undir allari undirvísing. |
| **Innihald:** | Bólkaarbeiði og orðaskifti um gerandisdagin í skúlanum við støði í støðisnámsætlanini. |
| **Fyrireiking:** | Lesið støðisnámsætlanina og gerið tykkum hugsanir um, hvørjir partar longu eru verksettir í undirvísingini og hvussu. Og hvørjir partar ikki í nóg stóran mun eru verksettir í undirvísingini. |
| **Tilfar:** | Klepriseðlar í trimum ymiskum litum, t.d. gulir, appilsingulir og grønir, og pappírsørk í A2-stødd. |

**Bólkaarbeiði:** Arbeiðið í bólkum (4-6 fólk) við parti 1, 2 ella 3 í støðisnámsætlanini. Skipið tað soleiðis, at umleið eins nógvir bólkar arbeiða við hvørjum parti.

Partar í støðisnámsætlanini:

- Virðisgrundarlag, partur 1 við undirpørtum.
- Førleikar, partur 2 við undirpørtum.
- Meginreglur fyri undirvísing, partur 3 við undirpørtum.

**Lesing (20 min.)**: Lesið hvør sær tilfarið í støðisnámsætlanini. Viðmerkið við ymsu klepriseðlunum, meðan tit lesa.

- **Gult**: Okkara skúli ger eitt gott arbeiði á hesum økinum.
- **Appilsingult**: Á hesum økinum átti okkara skúli at gjørt meira.
- **Grønt:** Ymiskt – tankar og spurningar.

**Í bólkum (30 min.)**: Greiðið hvør sær heilt stutt frá, hvat tit hava viðmerkt við gulum klepriseðlum. Setið síðan allar teir gulu klepriseðlarnar á A2-arkið.

Gerið síðan tað sama við ávikavist appilsingulu og grønu klepriseðlarnar.

Tá allir klepriseðlarnir eru komnir á A2-arkið, skulu tit kanna, um tit hava somu fatan av skúlanum viðvíkjandi økjunum í støðisnámsætlanini.

- Eru tit samd um øki, har skúlin ger eitt gott arbeiði?
- Eru tit samd um øki, har skúlin má gera meira?
- Er nakar felagsnevnari í tykkara tankum og spurningum?

**Felags (40 min.)**: Stuttar bólkaframløgur við støði í A2-ørkunum og klepriseðlunum. Rúm skal eisini vera fyri orðaskifti.

**Uppfylging:** Leiðslan syrgir fyri, at møguligir spurningar verða svaraðir, og at hugskot verða loftað í ráðleggingini framyvir.